


Fleiri rásir - einki roks

Á 3+ hóskvøldið 30. sept. kl. 20.00

# Zorro

Tað eru liðin fleiri enn 20 ár síðani, at Don Diego de la Vega (Anthony Hopkins) stríddist móti spanska yvirvaldinum í Alta, California, undir heitinum, Zorro. Hetta endaði við, at hann varð fongslaður, og eftir 20 ár í geglinum roynir hann nú at finna mannin, sum kann halda fram við stríðnum móti Don Rafael Montero (Stuart Wilson). Ein vadsmikil guvernørur, sum at enda tók frælsið frá de la Vega. Montero hevur ætlanir um at keypa California frá mexicanska forsetanum, Santa Anna generali.

Alejandro Murieta (Antonio Banderas) er ein bandittur við eini ivingar-samari fortíð, men hann vísur seg at vera júst maðurin, sum de la Vega leitar eftir.

Tað eydnast eisini gamla Zorro at skapa sín eftirfylgjara, soleiðis at ætlanirnar hjá Montero eina feð fyri allar kunnu burturbeinast. Nýggi Zorro fer í svarta kappan hjá undanmanni sínum, og so fer hann í herna móti yvirvaldinum. Á vegnum hittir hann eisini eina vakra kvinnu, sum onkursvegna stavar frá fortíðini hjá de la Vega, og so verður talan um eitt ævintýr av teimum góðu gomlu. Fylt við romantikki, kærleika, æru, vanlagnu og endaliga sigrinum. Og til tíðir er talan so sanniliga eisini um stuttligar hendingar, sum veruliga lýsa, hvussu trupult tað kann vera hjá einum ránsmanni, at hann nú brádliga er hetja.



*Catherina Zeta-Jones hevur leiklutin sum vakra kvinnan, sum onkursvegna eisini hevur nakað við fortíðina hjá Zorro at gera*



*Tað eru teir báðir, Anthony Hopkins og Antonio Banderas, sum hava høvuðsleiklutirnar í hesi útgávuni av Zorro. Maskuklædda hevnaranum*

# Uppsagnarfreist – tvær vikur

ÁCanal+ film1 fríggjakvøldið 24. sept. kl. 20.00



*Hugh Grant spælir upp til sítt allarbesta í hesum filminum, og tað sigur ikki so lítið*



*George Wades hevur ovurstóran tørv á Lucy Kelson, men hann vil ikki vísa tað, og endin er eisini, at hon sigur upp*

Lucy Kelson (Sandra Bullock) er í starvi hjá ríka - men haldur merkisverda - advokatinum, George Wades (Hugh Grant). Lucy er sjálv ein framúr góður advokatur, við einum skjótum heila, sum eisini dugir væl at leggja strategiskar ætlanir. Arbeiðið sjálvt er heldur ikki nakar trupulleiki hjá henni, tí her trívist hon framúr væl. Trupulleikin er heldur stjórin og hansara æviga sjálvsgleði. Hóast hann neyvan hevði megnað at bundið sær slipsaknútin uttan hennara hjálp, og hóast hann er fult greiður um, at hann hevur brúk fyri henni í fyritøkuni, so letur hann hetta ongantíð koma til sjóndar. Samstundis er hann tó sjarmerandi sum fáur, men í longdini orkar hon tó ikki hetta meira. Hon ger tí av at siga upp, og sjálv er hon sannførd um, at hetta er tað einasta rætta at gera. Við góðu evnum sínum er nokk einki at ivast í, at hon fær eitt minst líka gott starv hjá øðrum fyritøkum, men spurningurin er so, hvørt tað bara var starvið ella ikki. Tað gongur heldur ikki long tíð, áðrenn hon er greið um, at hon í veruleikanum er forelskað í George. Men spurningurin er, hvørt hon skal siga honum hetta ella ikki.

Filmurin snýr seg fyrst og fremst um, hvørt tað nakran tíð er ov seint at siga fólki, at tú elskar tey, og er talan um eina framúr blanding av skemti, álvarsemi og romantikki. Júst soleiðis sum vit kenna Hugh Grant, tá hann spælir upp til sítt allarbesta.



FILMSTEIGURIN

# The Village

Tey skaptu eitt nýtt samfelag í vónini um eitt betri lív við tryggleika, felagskenslu og friði. Men tað er ein vápnaður friður, tí uttan fyri býin halda »tey sum vit ikki tosa um« til, og hóast hesi ikki koma nær býnum, so merkir hetta, at bygdin í veruleikanum er avbyrgd frá umheiminum.

Ikki tí at íbúgvarnir sakna umheimin nakað serligt. Tey liva sítt egna lív har næstrakærleikin er í hásætinum, og har veruligi kærleikin millum mann og kvinnu eisini sleppur at blóma.

Alt verður tó hótt, tá Lucia Hunt og tann blindi Ivy Walker noyðast at taka dystin upp við umheimin. Tað er altavgerandi, at tey fáa heilivág til bygdina, og so er spurningurin, um tey sleppa fram við teimum »sum eingin tosar um«

Við hesum filminum hevur Night Shyamalan enn einaferð skapt ein spenningsfilm, har myrkursins kreftir royna at taka valdið, men har tað eisini eru góðar kreftir, sum tora at taka dystin upp.





# DodgeBall

Peter LaFleur er ein sjarmerandi maður, sum als ongar ætlanir hevur um at stremba seg uppeftir her í lívinum. Men tá tann sjálvglaði White Goodman, sum millum annað eigur flottastu heilsumiðstøðina í býnum, setir sær fyri at keypa staðið hjá Peter, hevur hann fingið nóg mikið. Saman við sínum fasta kundaskara av sosialum taparum ger hann eitt lið, sum skal taka lut í árligu DodgeBall kappingini, har vinnandi liðið fær 50.000 dollarar. Júst upphæddin, sum Peter hevur tørv á, um hann skal bjarga tí, sum hann hevur nýtt alla sína orku uppá.





Fríggjadagin 24.09. kl. 20³⁰ Fríggjadagin 24.09. kl. 23³⁰
Leygardagin 25.09. kl. 20³⁰ Leygardagin 25.09. kl. 23³⁰
Sunnudagin 26.09. kl. 19³⁰ Sunnudagin 26.09. kl. 22³⁰

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Frumsýning
Fríggjadagin 24.09. kl. 19⁰⁰ Fríggjadagin 24.09. kl. 21¹⁵
Leygardagin 25.09. kl. 19⁰⁰ Leygardagin 25.09. kl. 21¹⁵
Sunnudagin 26.09. kl. 18⁰⁰ Sunnudagin 26.09. kl. 20¹⁵




Fríggjadagin 24.09. kl. 23⁰⁰ Leygardagin 25.09. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 26.09. kl. 22⁰⁰




Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.
Fríggjadagin 24.09. kl. 17⁰⁰ Leygardagin 25.09. kl. 17⁰⁰
Sunnudagin 26.09. kl. 16⁰⁰




Við enskari talu og donskum teksti – Billettprísur: 55,- kr.
Fríggjadagin 24.09. kl. 18³⁰ Leygardagin 25.09. kl. 18³⁰
Sunnudagin 26.09. kl. 17³⁰